# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 30.05.2024 kl. 17.00

Á fundi: Janus Thomsen
Niels Olaf Eyvindsson
Martin í Nesi
Eir J. Norðberg
Thorstein Thomsen
Poul Laust Christiansen
Heri Norðberg (fyri Ronni Hammer)

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

Formaðurin bað um loyvi at taka eitt mál við aftrat – játtað og kemur á skrá sum mál nr. 5.

1. **102-22-2024: Góðkenning av roknskapi fyri 2023 .**

Ársroknskapur hjá Hvalbiar Sóknar Kommunu fyri 2023 til góðkenningar. Inntøkurnar frá kommunuskatti og øðrum inntøkum eru tkr. 39.354, rakstrarútreiðslur tkr. 32.147, rentustuðul og rentuútreiðslur tkr. 1.159 og løguútreiðslur tkr. 4.211. Roknskapurin gevur eitt avlop á tkr. 1.837.

| | **Rakstur:** | | **Løgur:** | |
|---|---|---|---|---|
| §1. Kommunal fyrisiting | tkr. | 2.494 | tkr. | 0 |
| §2. Almanna- og heilsumál | tkr. | 11.884 | tkr. | 0 |
| §3. Børn og ung | tkr. | 6.600 | tkr. | 0 |
| §4. Undirvísing | tkr. | 3.036 | tkr. | 222 |
| §5. Mentan og frítíð | tkr. | 1.725 | tkr. | 0 |
| §6. Teknisk mál | tkr. | 3.443 | tkr. | 2.606 |
| §7. Kommunal virki | tkr. | 2.965 | tkr. | 1.384 |
| **Íalt** | **tkr.** | **32.147** | **tkr.** | **4.211** |

Skattainntøkur vegna eldraøkið eru tkr. 9.555. Rakstrarútreiðslurnar til eldrasamstarvið eru tkr. 9.576 – leiguinntøka av sambýlinum er tkr. 362, nettokostnaður til eldrasamstarv er sostatt tkr. 9.214.

**Fíggjarnevndin 30.05.2024:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at góðkenna ársroknskapin fyri 2023.

**Avgerð:**
Roknskapurin fyri 2023 einmælt samtyktur.

Heri Norðberg luttók ikki í viðgerðini av máli nr. 2

2. **<u>102-17-2024: Avtala við Sandvíkshagan viðvíkjandi moldgoymsluni</u>.**

   Skriv frá Jóhan Eli Poulsen vegna Sandvíkshagan, har sagt verður, at teir eru sinnaðir at leingja verandi avtalu um tyrvingarpláss, ið gekk út 31.12.2023.

   **Tekniska nevnd 28.05.2024:**

   Nevndin mælir til at leingja avtaluna við Sandvíkshagan um moldgoymsluna í 4 ár.

   **Fíggjarnevndin 30.05.2024:**

   Einmælt samtykt at mæla til at leingja avtaluna í fýra ár frá 01.01.2024. Leingjanin er treytað av góðkenning frá friðingarmyndugleikanum og verður avtalan longd samsvarandi tíðarskeið, sum loyvið frá teimum verður givið.

   **<u>Avgerð</u>:**

   Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

3. **<u>102-18-2024: Skúlastykkið v.m. – uppskot til skipan av økinum</u>.**

   Mælt verður til at fáa gjørt uppskot um, hvussu Skúlastykkið og Gamli skúli kunnu skipast soleiðis, at økið verður meiri opið og innbjóðandi, til tess at økja um trivnaðin í bygdini.

   Lagt verður eisini upp til at umhugsa, hvussu Roynhøllin, vøllurin og flotin kunnu samansjóðast við Skúlastykkið og Gamla skúla.

   **<u>Avgerð</u>:**

   Samtykt varð einmælt, at Janus Thomsen setur seg í samband við ein arkitekt, ið kann koma við uppskoti um, hvussu øll fríøkini í sóknini kunnu skipast á besta hátt.

4. **<u>102-20-2024: Skriv viðvíkjandi summarfrítíð á dagstovninum</u>.**

   Sjúkrahússtjórin vísir á trupulleikan við at manna størv á Suðuroyar Sjúkrahúsi um summarið, nú allar kommunurnar í oynni lata barnaansing aftur í summarfrítíðini.

   **Trivnaðarnevndin 14.05.2024:**

   Nevndin vísir til, at leiðarin á dagstovninum í fleiri ár hevur sagt frá, at tørvurin á ansing hetta tíðarskeiðið er so at siga eingin (null til 2 børn). Tí hevur kommunan í ár tikið støðu til at fylgja tilmælinum frá leiðaranum um at hava stongt hesar ávísu vikurnar.

   **Fíggjarnevndin 30.05.2024:**

   Samtykt varð einmælt at vísa á upplýsingar frá dagstovnaleiðaranum um, at tørvurin á ansing hetta tíðarskeiðið hevur verið so gott sum eingin og hevur kommunan tí í ár, sum eina roynd, valt at steingja tríggjar vikur í summar. Hetta kann eftirmetast komandi ár.

   **<u>Avgerð</u>:**

   Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

5. **<u>102-19-2024: Umsókn um loyvi at gera skráa, parkeringarpláss og nýtt tún við Sandvíkar kirkju.</u>**

   Kirkjuráðið í Sandvík søkir um loyvi at gera ein skráa við kirkjuna til fólk við rørslutarni, samstundis sum ætlanin er at gera átta parkeringarpláss, harav eitt er til avlamisbil. Eisini er ætlanin at leggja verandi tún av nýggjum.

**Tekniska nevnd 28.05.2024:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at geva loyvi og fylgja tilmælinum frá byggimálsviðgeranum til hetta, treytað av, at ognarviðurskiftini eru komin uppá pláss og at SEV og Net verða fráboðað áðrenn arbeiðið byrjar.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá nevndini og byggimálsviðgeranum og geva loyvi sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum, treytað av, at arbeiðið verður framt í fullum samsvari við hjálagda loyvi og at tey seta seg í samband við arbeiðsformannin, tá arbeiðið verður gjørt.

6. **Ikki alment mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 19.15

Janus Thomsen Niels Olaf Eyvindsson Martin í Nesi

Eir J. Norðberg Thorstein Thomsen Poul Laust Christiansen Heri Norðberg